# 10 ár við Rúsuni

**Rúsdrekkasøla Landsins hevur selt fyri yvir níggjuhundrað milliónir, síðani einkarsølan lat upp fyri tíggju árum síðani. Stjórin er tó ikki í iva um, at einkarsøla er besta loysnin**

RÚSDREKKA
*Heri á Røgvi*

Í dag, leygardagin, eru 10 ár liðin síðani síðani fólk í hópatal savnaðust við Hoyvíksvegin í sambandi við, at Rúsdrekkasøla Landsins byrjaði sítt virksemi. Síðani tá eru røðirnar uttanfyri kanska minkaðar nakað, men sølan er støðugt voksin. Drykkimentanin stendur við.

Rúsdrekkasøla Landsins byrjaði sítt virksemi í tráð við eina nýggja rúsdrekkalóg, sum eisini fór at virka hetta árið.

Samlaða sølan hjá Rúsdrekkasøluni hevur eisini verið omanfyri 900 milliónir til í dag.

Tølini fyri í eru ikki greið enn, men til og við 2001 hevði Rúsdrekkasølan selt fyri 839 milliónir. Við søluni í ár fer talið upp um níggjuhundrað.

Nógv tann størsti parturin av hesum pengum enda í landskassanum. Í 2001fekk landskassin 76,4 mió. bara í lituravgjaldi og tolli og meirvirðisgjaldi.

Sølan er eisini voksin á hvørjum ári. Undantikið er 1995, tá sølan fall nógv. Eisini í 2000 gekk sølan nógv fram.

—Tað hevur víst seg, at sølan veksur við keypiorkuni. Tað er ikki soleiðis, at fólk fara at drekka meira, tá kreppan er í landinum, sigur Dagmar Joensen, sum hevur verið stjóri fyri Rúsdrekkasøluna øll árini.

### Mentanin broytist ikki

Dagmar Joensen heldur ikki, at drykkimentanin hjá føroyingum er broytt seinastu tíggju árini.

–Tað vísir seg, at føroyingar drekka í frítíðini og nýta rúsdrekka sum veitsludrykk. Hetta tekur meira enn tíggju ár at broyta, sigur hon.



*Dagmar Joensen, stjóri fyri Rúsdrekkasølu landsins, sigur, at einkarsøla er tann besti mátin at halda søluni á einum so lágum støði sum gjørligt. Endamálið við rúsdrekkalógini er nevniliga at minka um nýtsluni.*

Fólk duga tó betri at keypa nú enn fyri tíggju árum síðani. Ølið er framvegis nógv tað mest selda, og fólk drekka spakuliga meira vín.

–Munur er sjálvandi á. Vit hava nú fleiri hundrað sløg at velja ímillum. Hendan møguleikan høvdu fólk ikki, tá bíleggjast skuldi úr Danmark.

Dagmar Joensen fegnast tó um, at føroyingar drekka minni enn fleiri onnur lond í norðanlondum.

– Í tølum eru vit í miðjuni, men vit hava tað væntandi tað mest rætta talið, og tí liggja vit væl fyri í so máta.

### Besta loysnin

Dagmar Joensen er sjálv ikki í iva um, at einkarsøla er besti mátin at tálma rúsdrekkanýtsluni.

–Royndir aðrastaðni hava víst, at tú fært best hildið nýtsluni niðri við einari einkarsølu. Eisini ES hevur viðurkent hetta sum besta mátan, og hava tí givið Finnlandi og Svøríki loyvi at halda fram við einkarsølu, sigur Dagmar Joensen.

Stjórin fyri Rúsdrekkasøluna vísir staðiliga aftur øllum tosi um fría sølu av rúsdrekka í handlunum.

–Við einkarsøluni fært tú stýrt nýtsluni á bestan hátt. Her fært tú bara rúsdrekka, og hetta ger, at fólk ikki drekka so nógv sum aðrastaðni, sigur Dagmar Joensen.

## Restorffs lýsti ólógliga

**Dómarin gav fútanum fult viðhald í ákæruni móti Restorffs bryggjaríi**

RÆTTARMÀL
Heri á Rógvi

Dómarin Jørgen B. Petersen metti, at Restoffs bryggjarí breyt ásetingarnar í rúsdrekkalógini við sínari lýsing í Dimmalætting, har lýst varð fyri “páskaløgi”, og orðið øl stóð áskrivað.

Dómarin segði í sínum úrskúrði, at í samlaða metingini av lýsingini metti hann, at lýsingin var fyri rúsdrekka við hægri alkoholstyrki enn 2,8%.

Restorffs bryggjarí varð dømt at hava brotið ásetingarnar í rúsdrekkalógini, og fylgjan av tí er eitt bót aljóðandi 10.000 kr. Afturat hesum skal Restorffs eisini gjalda sakarmálskostnaðin.

Dómarin hevði eisini aðrar generellar viðmerkingar til tann næsta fulla rættarsalin, tá dómur varð sagdur fríggjadagin.

Hann vildi gera greitt, at tað var ikki uppgávan hjá rættinum at gera av, um rúsdrekkalógin er dupultmoralsk ella samanbera við aðrar lýsingar. Hetta kann rætturin gera, tá eitt tílíkt mál kemur fyri.

Òli Svenn Nolsøe, stjóri fyri Restorffs bryggjarí, segði eftir dómin, at hann metti dómin vera løgnan.

—Eg meti ikki, at teir hava prógvað, at vit lýstu fyri sterkum øli einans í lýsingini. Lýsingin var fyri bryggjaríið, sigur Óli Svenn.

Restorffs bryggjarí umhugsar í løtuni, um málið skal kærast til landsrættin. Hin stjórin, Johan Mortensen, helt fyri eftir rættarfundin, at teir nú heldur ætla sær at lýsa í útlendskum bløðum og tíðarritum.

Finn Ougaard, varafúti og ákæri í málinum, segði eftir at dómurin varð sagdur, at hann var væl nøgdur.

—Vit fingu tað, vit bóðu um. Vit hava gjørt tað skyldu, ið samfelagið áleggur okkum, sigur Finn Ougaard.

Fútin hevur latið Føroya rætti ákæruskrift um tríggjar lýsingar hjá Føroya Bjór í Dimmalætting. Eisini ákæran móti Club 20 bíðar eftir nýggjum rættardegi.



*Rúsdrekkasøla landsins hevur seinastu árini selt fyri omanfyri 100 milliónir árliga. Landskassin hevur eisini fingið ein fittan part við teimum nógvu og stóru avgjøldunum.*





*F. v.: Anna Marie Nyby, Mary Husgaard, Hedvig Svensson, Hans Mortensen, Hallgerð Johannesen, Oddvør Jacobsen og Kári Justinussen. Umframt tey á myndini hava Jórun Johannesen og Jørgen P. Jørgensen eisini starvast í SMS í 25 ár*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Hava handlað í SMS í 25 ár

**Í dag er liðin fjórðings øld, síðani SMS síðani SMS á fyrsta sinni kundi bjóða viðskifitafólki til handils í Sølumiðstøðini á Trapputrøðni**

HANDIL
*Eirikur Lindenskov*

Í dag eru liðin 25 ár síðani, at SMS lat upp dyrnar á fyrsta sinni.

Tað var kortini longu í 1973, at Hans Mortensen, saman við øðrum stovnaði felagið aftan fyri SMS.

– Tórshavnar Býráð hevði ætlanir um sølumiðstøð á Trapputrøðni. Hetta skuldi gerast á tann hátt, at gjørd varð ein høvuðsgøta, har handlar so kundu byggja sær handilshøli framvið. Tá alt so var liðugt, skuldi tak leggjast á, sigur Hans Mortensen.

Hetta hugskot helt Hans Mortensen ikki vera tað besta, og tí bar hann upp á mál við býráðið um ta loysnina, sum seinni gjørdist SMS.

– Hetta var ein tung prosess, og málið var fyri í býráðnum fleiri ferðir, men tað endaði so við, at Petur Christiansen, borgarstjóri, kundi skjóta fyrista skotið í 1976.

### Bert tvær lonir

Tá ið SMS lat upp tann 2. november í 1977, var SMS ikki tað, ið tað er í dag. Tá vóru bert tvær lonir – og handlarnar kundu tú telja á fingrunum.

Men ætlanin var altíð, at byggjast skuldu fleiri lonir afturat, og í 1980 var farið undir at byggja hinar fýra lonirnar.

Seinni í áttatiárunum vóru aðrar um- og útbyggingar gjørdar, ein tann størsta, tá parkeringskjallarin og goymsluhølini norðanfyri vórðu gjørd.

### Fekst neytakjøt á borðið

Fyri havnarborgarar – og føroyingar annars – var tað nakað nýtt at kunna fara til handils »undir taki«. Nógv varð tosað um, at hetta fór at køva miðbýin, og tað vóru fólk, sum als ikki vildu seta sín fót í SMS av slíkum grundum. Men í dag munnu tey vera fá, ið ikki keypa í SMS av hugsjónarligum orsøkum.

Tað, sum eisini sermerkti SMS var matvøruhandilin Superland, sum skifti navn til Miklagarð fýra mánaðir eftir upplatingina, tann 1. mars 1978.

Umframt at hetta var ein stórur handilin, so bar nú eisini til at keypa fekst neytakjøt, sum var innflutt úr Danmark í kølibingjum.

Leiðari í slaktarínum í SMS tá var tann 26 ára gamli danin, Jørgen Jørgensen – og har er hann enn.

– Eg hevði ongantíð verið í Føroyum áður, tá eg kom higar í august í 1977. Eg fall væl til, men eg má siga sum er, at »kjøtmessiga«, so var tað eitt sjokk, sigur Jørgen Jørgensen smílandi.

Hann sigur, at tey beinanvegin fóru at leggja til rættis, hvussu fekst neytakjøt kundi innflytast úr Danmark, og gjørdar vóru serligar kølibingjur at flyta kjøtið í.

– Tað hevur alla tíðina verið málið hjá okkum at hava gott kjøt, sigur Jørgen Jørgensen, sum vísir á, at tey nú innflyta kjøt heilt sunnan úr New Zealandi hinu megin klótuna – og tað er fyrsta floks kjøt, sigur hann – kjøt av neytum, sum liva í Guds fríu náttúru, neyt, sum ongantíð hava kent rákan av hvørki kraftfóðuri ella heilivági.

### 25 ár í SMS

Samstundis sum hetta er 25 ára føðingardag hjá SMS, so er tað eisini 25 ára starvsdagur hjá fleiri starvsfólkum í SMS – og tey verða heiðrað á veitsluni, sum SMS skipar fyri á Hotel Föroyum í kvøld.

Viðskiftafólkið hjá SMS hevur eisini merkt til føðingardagin seinastu vikuna, og í dag verður eisini ymiskt á skránni – bæði fyri ung og gomul. Opið verður til kl 17, og byrjað verður kl 9:30, tá SMS bjóðar kakao og bollar.

Undirhald verður allan dagin við eitt nú Havnar Hornorkestri, gandakalli og Tórshavnar Manskór fer at syngja. Eisini fer Angela at skipa fyri undirhaldi fyri børnum.



*Tá Petur Christiansen, borgarstjóri í Havn skjeyt fysta skotið av til SMS. Saman við Petur C síggjast Hans Mortensen, stjóri í SMS og 10 ára gamli sonurin, Niels, sum í dag eisini er stjóri í SMS*

# Johan verður eisini 25 í dag



*Hans Mortensen, stjóri í SMS, og Jóhan Johannesen, javnaldurin hjá SMS, ynskja hvør øðrum tillukku við 25 ára degjum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Jóhan Johannesen úr Fuglafirði er føddur sama dag, sum SMS lat upp á fyrsta sinni, 2. november 1977. Av teirri orsøk fekk hann sum smádrongur á hvørjum ári gávu frá SMS**

25 ÁR Í DAG
*Eirikur Lindenskov*

Hvør minnist ikki tann fitta smádrongin úr Fuglafirði, sum altíð fekk gávur, tá SMS hevði føðingardag?

Jú, tað var Jóhan Johannesen, sonur Frits og Alexandru. Hann varð føddur sama dag, sum SMS lat upp á fyrsta sinni – og hetta var orsøkin til, at hann gjørdist eitt slag av maskotti hjá SMS.

– Jú, eg var helst eitt slag av promotiondreingi hjá SMS, sigur Johan smílandi, tá vit hitta hann.

Jóhan lesur útflutningstøkni í Odense, og er hann í løtuni í praktikki hjá fiskasøluni Farex í Havn.

Jóhan minnist sjálvandi ikki byrjanina, men hann minnist, at hann fekk gávu, hvørja ferð SMS hevði føðingardag, og hann fekk eisini pengar á bók til uppsparing – einar 500 krónur hvørja ferð, til hann fylti 15 ár.

– Tað var kanska eitt sindur troyttandi hjá okkum altíð at skula vera har – og eg skuldi »stillast út« – tá føðingardagur var. Men vit vóru har ofta, sigur Jóhan.

– Vit góvust, tá eg fylti 10, men vóru aftur har, tá eg fylti fimtan fyri seinastu ferð, sigur Jóhan, sum eisini verður at síggja í SMS í dag.

